# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Edna Niclasen 60 ár

Leygardagin 18 juli rundar Edna Niclasen í Sørvági tey seksti.

Edna er fødd og uppvaksin í Nólsoy, dóttir Gunhild og Jákup Joensen, bæði úr Nólsoy. Edna og tey eru átta systkin, tveir beiggjar og seks systrar.

Edna gekk í barnaskúla í Nólsoy, og eftir barnaskúlan fór hon til Havnar, sum so mangur tá ið tíðini í húspláss.

Um kvøldarnar gekk hon í Handilsskúla, og eftir loknan handilsskúla var hon eina tíð á skrivstovuni hjá Valdemar Lützen, harnæst gekk leiðin til Danmarkar at arbeiða og á háskúla í Nørre Nissum, áðrenn leiðin gekk heim aftur til Føroyar. Í løtuni arbeiðir Edna á flogvøllinum við reingerð og trygdareftirliti (Security).



*Edna saman við ommubørnunum*

Í tey 30 árini ið hon hevur búleikast í Sørvági hevur hon undirvíst í kvøldskúlanum í hondarbeiði, og er hon virkin innan fyri so at siga alt handaligt arbeiði. Tað eru mong pløgg til tann føroyskan búnan, hon hevur gjørt.

Urtagarðsarbeiðið hevur hennara stóra áhuga, og sæst tað aftur í tí avbera vakra urtagarðinum uttan um heim hennara í Sørvági. Edna hevur altíð teknað og havt hug til eisini at mála. Nú gongur hon so á kvøldskúla at læra at mála, og bíðað verður við spenningi upp á, hvat tað kann føra til.

Edna er gift við Finnboga Niclasen av Tvøroyri, og eiga tey trý børn og átta ommu- og abbabørn.

Opið hús verður leygardagin 18. juli í heiminum í Gerðinum 17 í Sørvági frá kl.13 – 20, har øll eru hjartaliga vælkomin.

*-red*

## Pattison í Smiðjuni

Tað er í dag, hósdagin 16. juli kl 16.00, at listakvinnan Jan Pattison letur upp ein listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Hon sýnir fram oljumálningar við myndevnum úr Føroyum.

Jan er ættað úr lítlu skotsku bygdini Lugar, og hon býr í Kilmaurs á vestursíðuni á Skotlandi. Hóast hon ikki er føroysk, hevur hon tó sterk bond til Føroya. Maður hennara Peter er hálvur føroyingur, og tí hava tey altíð ferðast nógv til Føroya. Peter er sonur Poulinu Pattison, f. Toftum, ið møtti enskum hermanni undir krígnum, sum hon giftist við. Seinni fluttu tey til Skotlands, har Peter og báðir brøðurnir vuksu upp.



*Jan Pattison við einum av sínum málningum*

Jan tók prógv sum listamálari á kenda listaskúlanum Glasgow School of Art í 1973, eftir fýra ára útbúgving

Jan og maðurin hava rikið eina sniðgávu- og framleiðslufyritøku, sum framleiðir handtaskur og tilhoyr úr leðri. Jan hevur arbeitt í 30 ár sum sniðgevi í fyritøkuni. Seinastu árini hava tey minkað um fyritøkuna, og tískil hevur Jan meira stundir at mála. Jan hevur ferðast ofta til Føroya, síðan hon møtti manninum, t.e. í eini 40 ár. Fyri trimum árum síðan keyptu hon og maðurin hús á Eiði, og nú liggur væl fyri hjá Jan at mála.

Hon er hugtikin av føroyska landslagnum, og tað sæst aftur í myndunum. Hon velur sær helst myndevni úr føroysku náttúruni ella av bygdarløgum. Hon hevur sín egna stíl, og tað, ið fangar við málningum hennara, eru serligu litirnir, ið hon nýtir til at lýsa og endurspegla ljósbrigdini við. Myndevnini eru ymsastaðni úr Føroyum. Maðurin Peter er ágrýtin fotografur, og á framsýningini sýnir hann fram nakrar av panoramamyndum sínum av landsløgum.

Í dag er framsýningin opin frá kl. 16 – 18. Frá 17. til og við 21. juli verður opið frá kl. 12 til 18, og mikudagin 22. juli verður opið frá kl. 10-14.

Meira fæst at vita um Jan Pattison á www.janpattison.co.uk

*-red*

---

†

### Andlát og jarðarferðir

**Lisa Julina Johansen,** fødd Jacobsen, ættað úr Hósvík, búsitandi í Brøndby Strand, andaðist á Herlev sjúkrahúsi leygardagin 11. juli, 78 ára gomul. Jarðarferðin verður mikudagin 22. juli frá Brøndby Vester Kirkju kl. 13

**Flemming Holm,** ættaður úr Prestgarði í Hvalba, andaðist í Reykjavík 9. juli, 81 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Gravvágs kirkju 22. juli klokkan 13.

**Anna Cathrina Blásvær** ættað úr Norðragøtu, búsitandi í Danmark andaðist leygardagin, 91 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Munkebo kirkju fríggjadagin 17. juli kl. 14.

---

†

**Anna Hansen**
**Ballerup**
ættað úr Hoyvík
einkja eftir Jógvan S. Hansen,
ættaður úr Vátutoft, Klaksvík

andaðist 10. juli, 91 ára gomul.
Jarðarferðin verður fríggjadagin 17. juli kl. 12.30
úr Skovvejens kirke, 2750 Ballerup.

*Vegna familjuna*
**Sigurd Simonsen, Hoyvík**

---

## Terminalar til keypsstevnur og festivalar

TÍÐINDASKRIV

Til tey sum ætla sær at selja vøru uttan fyri vanliga handilin sum t.d. á festivalum ella keypsstevnum, leiga vit tráðleysar kort-terminalar til nógv ymisk endamál, sigur Martin Brodersen frá Wellness á Áarvegi 4 í Havn, sum leggur afturat at hetta kann verða ein fyrimunur bæði hjá teimum sum selja og keypa. Øll eru vælkomin at seta seg í samband við okkum á wellnes.fo í hesum sambandi.

---

**Dagurin**
**16. juli. Súsanna.** Í apokrýfisku bókunum verður sagt frá, at Súsanna, kona Jójakims í Bábel, varð løgd undir ótrúskap, men varð bjargað av profetinum Dánjali. Súsonnuvísa varð kvøðin í brúaransi í Føroyum. Navnið er hebráiskt og merkir lilja.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*